# Tiltøk

**Gudstænastur 21. nov.**
**Havnar kirkja:** kl. 11
Sonja Klein. Kl. 16 grønlendsk gudstænasta
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11
Uni Næs, altarg. Skriftamál kl. 10.40. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
**Vesturkirkjan:** kl. 11
Lestur. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni.
**Argja kirkja:** kl. 11
Jógvan Fríðriksson, Bergur Debes Joensen og Derhard Jógvansson. Vígsla av nýggjum altarlutum. Altarg. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni
**Kollafjarðar kirkja:** kl. 12
Henning Bøgesvang
**Viðareiði:** kl. 12
Elsa Funding, altarg.
**Dalur:** kl. 12
Jákup R. Hansen, altarg.
**Æðuvík:** kl. 11.
Martin R. Jacoobsen
**Christianskirkjan:** kl. 11
Mangus B Jørgensen
**Húsar:** kl. 12
Hanus á Gørðum altarg.
**Mikladalur:** kl. 15
Hanus á Gørðum altarg.
**Hvalba:** kl. 12.30
Jónsvein Bech
**Sandvík:** kl. 18
Jónsvein Bech
**Funningur:** kl. 12
Emil Olsen, messa
**Christianskirkjan:** kl. 11
Magnus Brahé Jørgensen
**Norðoya sjúkrahús:** kl. 10
Magnus Brahé Jørgensen, andakt
**Norðoya røktarheim:** kl. 14.30
Magnus Brahé Jørgensen, andakt
**Tvøroyri:** kl. 11
Bjarni Bæk
**Kvívík:** kl. 12
Theodor E. D. Olsen
**Leirvík:** kl. 12
Niels Pauli Danielsen
**Hvalba:** kl. 12.30
Bjarni Bæk

**Adventistakirkjan**
Leygardagin kl. 10 Bíbliugrannsking við Edvard Andreasen. Kl. 11 Gudstænasta við Hanne Schantz.

**KFUM og KFUK í Havn**
Leygardagur kl. 15 í KFUK: Basarur. Mánadagur 22. nov. kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Jákup Reinert Hansen presti. Evni: 1. Trúargrein – Skapanin.

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/Hjørleiv Poulsen.

**Lívdin við Løgmannabreyt**
Sunnudagur Familju- og tilbiðjanarmøtið byrjar kl. 10.30 og lovsongur og tala kl. 12. Sunnudagsskúli, unglív og barnaansing er meðan seinna møti er kl. 12 Á seinna møtinum kl. 12, talar Jógvan Zachariassen um "2010 familjan – Tá hjúnarbandið slitnar" Hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/ Sverri Steinhólm, dópur og altarborð. Innsavnan til útimissión. Øll eru vælkomin

**Fríkirkjan Oasan**
Fríggjakvøldið kl. 20 After8
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Magnus Simonsen kl. 12 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti
Verið hjartaliga vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Sunnudagur kl. 18
Møti v/ Óla Poulsen, Klaksvík

**Aglow í Havn**
bjóðar til nátturða og jólahugna á Hotel Føroyum sunnukvøldið kl. 19.30. Luttøka verður við Rúnu & Heðin Lamhauge og sangbólkinum Quinto. Kostnaður 100 kr. Tilmelding við at senda sms ella at ringja á tlf.: 259396, 252942 ella 261460. Kvinnur og menn verið vælkomin!

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, møti fyri børn frá 8 ár og uppeftir. Øll verða koyrd heim eftir møti. Kl. 21; Herur Jákups, umgdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/sunnudagsskúla. Verið hjartaliga vælkomin.

**Gongutúrur**
Sunnudagin verður gongutúrur: Djúpagilsvegur, Inn á Gøtu, nýggi Ringvegurin í Havn. Farið verður kl. 10 av Tórsbreyt, har túrurin eisini endar. Tilmelding á tlf. 302425 á torsinfo@torshavn.fo ella á Kunningarstovuni.

**Samkoman Marknagil, Fjalsg.2, Tórshavn**
Sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting. Kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti

**Filadelfia Tórshavn**
Fríggjadagin kl. 07.15 Morgunbøn. Kl. 20 Mammur hittast til bøn
Leygardagin Kl. 21 Flare
Sunnudagin Kl. 11 Morgunmøti. Kl. 13.15 SundagsKool.

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Barnaansing er í Lítla Sali. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelikst møti. Barnaansing er í Stóra Sali

**Hebron**
Sunnudagin kl. 10.30 morgunmøti. Kl. 12 sunnudagsskúli og møti, Jógvan Jacobsen talar úr Efesusbrævinum.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Sunnudagin
Kl. 11 Halgunarmøti v/Sunnudagsskúla
Kl. 17.30 Bøn
Kl. 18 Møti

**Miðvágs Missiónshús**
Eingin sunnudagsskúli sunnudagin vegna bygdalegu. Møti verður sunnudagin kl. 18.

**Missiónsvika í Bø**
Fríggjakvøldið kl. 20 Torleif Johannesen talar og Gunnleyg syngur. Leygarkvøldið kl. 20 Gullakur og Jóhilda luttaka við talu og sangi. Sunnudagin kl. 15 Familjumøti og kl. 20 Bergur Debes talar og Lovinda syngur. Hjartaliga vælkomin.

**Sands missiónshús**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 20.

**Sandur, missiónshúsið**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Møti kl. 18 við luttøku úr Meinigheitshúsinum úr Havn

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og kl. 18 møti v/Martin R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Eysturoyar Gongufelag**
Skipað verður fyri jólaborðhaldi leygardagin kl. 19.30 á Sjókafèini. Sí meira um luttøku á heimasíðu felagsins

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Sunnudagin kl. 11: Breyðbróting. Týskvøldið kl. 20: Bønar-og uppbyggingarmøti.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti

**Meinigheitshúsið á Skála**
Fríggjakvøldið kl. 19 juniormøti
Leygarkvøldið kl 20 ungdómsmøti við Mariann og Ingrid evni: Næstrakærleiki.
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti við Jónhildu og Gullak. Barnaansing. Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Felags vikuskiftismøtir við luttøku frá ymiskum samkomum verða leygarkvøldið kl. 20. Sunnudagin kl. 17 og barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.

**Aglow Eysturoy**
Alment jólamøti verður í Kelduni í Skálafirði fríggjakvøldið kl. 20. Talarar: Svenhild og Harald Haraldsen. Sangur: Oasubrøðurnir. Øll eru vælkomin

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjakvøld kl. 21 Ungdómsmøti v/Jórun Danielsen
Sunnudag kl. 17 v/Kári Højgaard Sunnudagsskúli

**Soli Deo Gloria**
Leygarkvøldið kl. 20 Felagsmøti í Kelduni. Sunnukvøldið kl. 17 Felagsmøti í Kelduni.

**KFUM & K í Klaksvík**
Leygadagin kl. 10 Marknaðardagur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta. Kl. 18 Møti við Jóhan Henriksen "Tú mást ikki sláa í hel - hvat kann tað siga mær í dag" Innsavnan til Útimissión. Kl. 21 Ungdómsmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Møti í skúlanum á Fossanesi. Ólavur Jacobsen talar, ung hava vitnisburð og dráma
Leygarkvøldið kl. 20 Møti í skúlanum á Fossanesi
Rói Norðoy talar, Heini Lützen leiðir lovsang.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti í Getsemane. Barnamøti er samstundis.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/breyðbróting.

**Missionshúsið á Viðareiði**
Fríggjakvøldið kl. 19.30 Niels Andreassen og Óli Poulsen tala og syngja.
Leygarkvøldið kl. 19.30 Regin Høgnesen truboðari talar Streingjakóirið í KFUM & K í Klaksvík syngur.
Sunnukvøldið kl. 18 Hanus á Gørðum prestur talar, Rebekka Fugloy syngur
Øll hjartaliga vælkomin

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30 og kl.18 verður møti við grønlandstoyminum. Meiri kunning á leirvikar.fo
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bethel, Vágur**
Fríggjakvøldið kl. 21.30 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti. John í Skemmuni og aðrir tala. Ymisk sangluttøka
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting
Kl. 12.30 Sunnudagsskúli
Kl. 18 Evangeliskt møti. Talarar úr oynni. Suðuroyarkórið syngur. Barnaansing verður meðan møti er. Øll eru vælkomin til hesi møtir.

**Tvøroyar kirkja**
Mánakvøldið 22. nov.
kl. 19 verður jólakonsert við Lindu Andrews. Eisini koma børn úr Trongisvágs skúla at medvirka. Innsavnað verður fyri tiltakið.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti vegna missiónsviku í Porkeri.

**Frelsunarherurin Vágur**
Fríggjadagin kl. 09.30 orðið á borðið.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti/sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/ Torhild &Niels Edvard Olsen. Øll eru Vælkomin.
Mánakvøldið kl. 20 bønarløta. Eisini minna vit á árasøluna sum verður 1. des. kl. 19.

**Sion Vágur**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti og kvøldmøti kl. 18.

**Missiónsvikan í Porkeri**
byrjar onskvøldið við guðstænastu í Porkeris kirkju. Jónsvein Bech, prestur prædikar og Streingjakórið syngur. Hon heldur fram tórskvøldið kl. 20 í Missiónshúsinum við Jógvan Højgaard og Ragnar Mortensen. Streingjakórið syngur.
Fríggjakvøldið tala Eivind Beck og Árni Kjærbæk.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag – hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Fríggjadag
Kl. 9-16 Motiónarúmið opið.
OBS !!! Kl. 16.30 Kvøldseta. Brota og bitar í 100 ár. Yrkingar, prosa, sangir og hugleiðingar. Lagt til rættis: Linubólkurin í Havnar Sjónleikarafelag. Hjálp og vegleiðing: Birita Mohr. Fylgispæl: Simme.
Mánadagur
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði. Tilmelding: 316491, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Í motiónsrúminum er rógvimaskina, kondisúkkla, renniband og krossari.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Enskt talumál í køkinum á 1. hædd.
Kl. 14 Kortspæl og onnur spøl.
Kl. 14-16 Telduskeið: Grundskeið (óroynd), Páll Poulsen. Tilmelding: 316491.
**OBS!** Jólaborð verður í Tilhaldinum fríggjadagin 10. des. kl. 18. Tilmelding: 316491. Kostnaður 250. Gjaldast í seinasta lagi 1. des. (Sjá matlepan á tilmeldingarseðilinum).
Týsdagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið.
Kl. 10 Sangur, Hanus Joensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 11-13 Telduskeið Víðkað skeið (alnótin), Páll Poulsen.
Kl. 14-16 Telduskeið Víðkað skeið (myndir), Páll Poulsen. Tilmelding: 316491.
Kl. 15 Prát. Øll eru vælkomin.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Pensionistafelagið í Havn**
Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 24. nov. kl. 19. Á skránni er upplestur. Tlf. 222733
finnurj@post.olivant.fo

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
hevur hugnakvøld týskvøldið 23. okt. kl. 19. Max Cecil Weihe heldur fyrilestur um ættarbond ímillum Skála og Selatrað.

**Føroysk advent- og jólaguðstænasta í Aalborg Klosterkirke**
Sunnudagin, hin 28. nov. kl. 14 verður føroysk guðstænasta í Aalborg Klosterkirke. Aftaná guðstænastuna fáa vit ein drekkamunn í grannalagnum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hugnaløturnar byrja aftur í Samuelskirkjuni Thorsgade 65, 2200 København N**
21. nov. kl. 14 Guðstænasta, minikonsert og døgurði. Tekning til døgurðan á tlf. 42247282 / 36498402.

**Blákrossbúðin, Kongagøta 10, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum, Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 10-12 og 14-17.30 og leygardag frá kl 11-14

**Blákrossbúðin, Heiðavegur 32, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum. Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 13-17:30 og leygardag frá kl 10-13.

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadag kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Landsfelag Pensjónista**
*Tróndargøta 13, Tórshavn*
Tlf. 319394 ella 219394
Skrivstovan er opin týsdag frá kl. 13 til 16.
landsfelagpensjonista@olivant.fo

## Merkisdagar

### Brúdleyp
Leygardagin 20. nov. giftast Heðin Ellingsgaard og Ulla Bundgaard í Nordby Kirke á Fanø.

### Diamantbrúdleyp
Fríggjadagin 19. nov. hava Ásla og Markus Heinesen, Haraldssund, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Gullbrúdleyp
Fríggjadagin 19. nov. hava Elisabeth og Páll Ellingsgaard gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Eiðisstovu sama dag frá kl. 8 til 13. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 70 ára føðingardagur
Leygardagin 20. nov. fyllir Thomas Arabo, 70 ár. Hann verður burturstaddur henda dagin.

### 60 ára føðingardagur
Týsdagin 16. nov. *fylti* Jan Ellebye Andersen, Klaksvík, 60 ár. Dagurin verður hildin 20. nov. kl. 19 í kantinuni í Tekniska Skúla. Hjartaliga vælkomin.

### 60 ára føðingardagur
Hensia Einarsson fyllir 60 ár fríggjadagin 19. nov. Dagurin verður hildin leygardagin 20. nov. millum kl. 11 og 17 á Tjarnargarði, Hoyvíksvegur 58 (Marinustøðin).